# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heppin gongd

Flestu okkara vóru vónsvikin, tá BP kunngjørdi, at Williambrunnurin var turrur. Hinvegin steðgar leitingin ikki, "bara" tí at enn eitt hol er turt. Oljuleiting er langtíðarlig prosess, so seks brunnar eru ikki nakað stórt tal í einum stórum og nýggjum ókendum leitiøki sum Føroyar.

Í gjár frættu vit so, at samanlagda oljufelagið StatoilHydro fer undir eina risa verkætlan á landgrunninum í næstum. Felagið hevur gjørt avtalu við seismikkfelag um at skjóta seismikk í hundrað milliόna klassanum. Hetta merkir, at norska oljufelagið, sum hevur verið eitt av teimum mest virknu í leitingini við Føroyar, nú av álvara fer undir at gera fyrireikingar til at bora aftur á landgrunninum. Tað eru góð tíðindi fyri okkara oljumyndugleikar.

At StatoilHydro nú sum eitt samanlagt og enn sterkari felag ger eina risaíløgu í kanningar á landgrunninum er eitt sera gott signal fyri føroyska oljuleiting sum heild, tí tað vísir, at oljufeløg hava ikki mist mótið eftir seinasta turra brunnin. Og hvør skuldi vita tað betur enn júst norska oljufelagið, at tað skal tol til. Á norska landgrunninum vórðu nevniliga boraðir meira enn 30 brunnar, áðrenn rakt varð við olju í rakstrarverdugum nøgdum. Og fyri at tað ikki skal vera lygn heldur, so vórðu boraðir einir 75 brunnar vestan fyri Hetland, áðrenn fyrsta oljuframleiðslan gjørdist veruleiki.

Í Føroyum skriva vit 2008, og higartil eru boraðir seks brunnar. Sum skilst standa tveir aftrat á skránni til 2009. ENI brunnurin er longu við at fara av bakkastokki, meðan enn ein brunnur, sum Chevron stendur fyri, nú skilst er komin á tekniborðið.

Vit hava tí orsøk til at fegnast, tá tað um framtíðar kanningar og boring ræður.
Vit hava so eisini fingið eitt størri skotbrá til at gera kanningar av møguleikum og avleiðingum, sum ein komandi oljuvinna fer at fáa fyri føroyska samfelagið. Landsstýrið við oljumálaráðharranum Tórbirni Jacobsen á odda hevur sett sær fyri at fara undir hesar kanningar, soleiðis at vit sum samfelag, vinnuliga, sosialt, mentanarliga og í allar mátar eru væl fyrireikað, tá fyrsta oljan møguliga kemur upp – ja skulu vit gita, einaferð millum 2012 og 2015.

**Sosialurin**

## Tøkk til Kringvarp Føroya (Útvarpið) og gongufaløg runt Føroyaland

**JÁKUP MÜLLER**

Hava nú hoyrt í útvarpinum um henda sera áhugaverda túr, sum Norðoya Sparikassi gjørdi saman við starvsfólkinum frá Viðvík niðan á Talvborðið saman við Útvarpinum, har Jón Heðin Tróndheim (í løtuni okkara Søren Rye Pedersen) gjørdi sendingina.

Jón Heðin hevur havt nógvar sera áhugaverdar fólkalívssendingar seinastu árini, tøkk skal hann hava fyri hesar.

Stóra tøkk til ferðaleiðaran Olevinus Sørensen av Viðareiðiði, sum so livandi greiddi frá um flogvanlukkuna undir krígnum, somleiðis læs upp úr Følv um somu hending eftir Villy Sørensen. Tey flestu minnast helst bara blaðið Følv fyri Læars og Annulenu?

Jón Heðin hevði eisini prát við Kristian Martin Eliassen úr Leirvík, sum saman við Óla Simonsen úr Saltangará eru leiðarar í Eysturoyar Gongufelag. Báðir óførir at finna áhugaverdar ferðaleiðarar.

Eysturoyar Gongufelag var annars túr sísta sunnudag á Sandoynni, har málið var Tindur, men sum ikki einaferð gjørdist sýnið heldur vánaligt, men hetta gjørdist tó sera livandi álíkavæl, tí ferðaleiðarin Jens Dalsgaard ættaður úr Skálavik (búðsitandi á Glyvrum) var væl fyrireikaður og geiddi so livandi frá, hvat síggjast kundi av Tindi, líkasum eín kann ímynda sær, tað Jón Heðin sær tað í eini útvarpsending.

Tað var annars ein góð kennsla at standa uppat varðanum við Krossinum ovast uppi á Tindi.

Komin oman til Skálavíkar, greiddi Jens meistarliga frá bygdini, søguni, sóðu minnisvarðar yvir Chr. Osvald Viderø og Heðin Brú og hoydu um áhugaverdu lívssøgu teirra, eisini vísti hann okkum á barnaheimið hjá einum av okkara kendastu vinnulívsmonnum - Eiler Jacobsen- .

Hitti annars hugnaligan skálvíking, sum gjørdi meg sera glaðan, tí hann segði mær, at hann ongantíð hevði verið uppi á Tindi.

Tøkk til stigtakarar til hesi ymisku gongufeløg í Føroyum.

## Hvussu nógv lesandi koma heimaftur?

**TÍÐINDASKRIV**
*Stuðulsstovnurin*

**Hvussu stórur partur av teimum lesandi føroyingunum uttanlands koma heimaftur eftir lokna útbúgving?**

Hesin spurningurin hevur verið nógv umrøddur seinastu árini. Mikumorgunin verður úrslitið av stórari spurnarkanning, ið Stuðulsstovnurin hevur latið gjørt, kunngjørdur. Í framløguni verða m.a. tøl løgd fram, sum vísa, hvussu stórur partur av teimum lesandi flyta heimaftur til Føroya eftir lokna útbúgving.

Annaðhvørt ár hava lestrarstuðulsstovnarnir í Norðurlondum ráðstevnu. Í ár er tað SU í Danmark, ið er fyriskipari av ráðstevnuni, og hava tey valt at leggja hana í Føroyum í døgunum 10.-12. juni. Á ráðstevnuni, ið verður hildin á Hafnia, luttaka umleið 50 fólk úr øllum Norðurlondum.

Tvey høvuðsevni verða á ráðstevnuni. Annað er framløga av norðurlendskari granskingarætlan um gagnvirði av hægri lesnaði, og hitt er um talgilding.

Viðvíkjandi norðurlendsku granskingarætlanini er tað soleiðis, at sama kanning er gjørd í Noregi, Finnlandi, Íslandi og Føroyum. Sama 12 síðis spurnarblað við umleið 90 spurningum varð sent lesandi úr hesum londum. Londini hava staðið fyri síni egnu kanning, og eru tað úrslitini hjá teimum einstøku londunum, ið verða framløgd á ráðstevuni. Danmark leggur eisini úrslit fram við støði í egnum skrásetingarupplýsingum. Ætlanin er at gera sammanberingar millum londini í eini felags frágreiðing í vetur.

Í føroysku kanningini hava allir lesandi føroyingar á hægri útbúgvingum her heima og uttanlands, og sum vóru lidnir við útbúgvingina í 2004, 2005 og 2006, fingið spurnarblaðið á vári 2007 sendandi. Yvir 60% av teimum svaraðu spurnarblaðnum. Tað er við støði í hesum svarum, at føroyska kanningin er gjørd.

Høvuðsspurningarnir, ið verða svaraðir í framløgunum á ráðstevnuni, eru:

Í hvønn mun koma tey, ið hava lisið uttanlands, aftur til heimlandið?

Hvat gagn ella hvørjar fyrimunir hava tey, ið hava lisið uttanlands, á heimliga arbeiðsmarknaðinum?

Hvat eyðkennir tey, ið velja at útbúgva seg uttanlands?

Hví velja lesandi at útbúgva seg uttanlands?

Hvussu fíggja lesandi lesturin uttanlands?

Føroysku kanningina hevur Jacob Mouritz Olsen, lesandi við Ålborg Universitet, gjørt fyri Stuðulsstovnin, og tað er eisini hann, sum leggur føroysku úrslitini fram á ráðstevnuni. Kanningin er fíggjað av StatoilHydro í Føroyum.

Ráðstevnan er ikki almenn, men eru føroysku fjølmiðlarnir vælkomnir at luttaka til føroysku framløguni kl.9.00 mikumorgunin 11. juni á Hotel Hafnia.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00 - 20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.